Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og fyrrapartin okkurt ælið, annars turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 12 stig.



# Fyri fyrstu ferð í 11 ár

*Fríggjakvøldið fer Jørgin Dahl aftur á pall í Føroyum, tá hann hevur konsert í Norðurlandahúsinum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Í 1989 var Jørgin Dahl saman við Straight Ahead eitt av høvuðsnavnunum, tá tann tiltikna 70'ara konsertin var í KÍ-høllini í Klaksvík. Síðani hevur hann ikki staðið á palli í Føroyum, men fríggjadagin ger hann comeback.

Jørgin Dahl er eitt av stóru nøvnunum á Jazzfestivalinum í ár, og saman við bólki sínum, Lost Pilgrims, fer hann at spæla í konsertsalinum í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið klokkan 22.10.

Orsøkin til hesa forkunnugu konsertframførsluna er, at fyrr í ár gav Jørgin Dahl eina soloútgávu út. Lost Pilgrims, sum fløgan nevnist, er tað fyrsta veruliga útgávan frá Jørgini Dahl síðani fyrst í 80'unum, tá hann var ein týðandi partur av Hjarnum.

**Av nýggju útgávuni**
Frammanundan Hjarnar var Jørgin Dahl sangskrivari og tónleikari í bólkinum Straight Ahead, sum var helst størsta navnið í føroyskum rocktónleiki í 70'unum. Straight Ahead gav fleiri plátur út, og seinasta var Veðraplátan, sum samstundis gjørdist seinast brakið hjá Straight Ahead.

Á konsertini í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið fara bæði danskir og føroyskir tónleikarar at spæla saman við Jørgini Dahl, og sangirnir, sum hann fer at spæla, verða allir av nýggju útgávuni.

Jørgin Dahl hevur áður nevnt møguleikan at trívа í onkran av gomlu og kendu sangunum hjá sær, men tað er óvist, hvussu tað verður við hesum fríggjakvøldið.



# Løgmaður á ríkisfundi

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Hugnaligt prát, góður matur, deilig samvera á einum fjónskum góðsi, nú eplatríni hokna av sevjumiklum súreplum , ongin strong og krevjandi dagsskrá, men uppbyggjandi prát um felags mál í The United Kingdom of Denmark. Tað er tað sum er hent nú Anfinn Kallsberg, løgmaður, og frú Berghild Kallsberg vitja í Danmark sum gestir hjá danska forsætisráðharranum dagarnar í gjár og í dag í sambandi við árliga Ríkisfundin, sum ár var hildin á Løgismose Gods á Fjóni.

Ríkisfundur verður hildin eina ferð um árið. Har hittast danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, grønlendski landsstýrisformaðurin, Jonathan Motzfeldt, og løgmaður Føroya, Anfinn Kallsberg, at viðgera ymisk mál, ið hava felags áhuga.




Hátrýstið yvir Skotlandi fer suðureftir. Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer eystureftir og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum mikudagin.




Lágtrýstið við Skotland fer estureftir, men ein hátrýstryggur vestanfyri Bretsku Oyggjarnar verður yvir Føroyum høskvøldið




**Hitalagið mált frá 07./08. kl 06⁰⁰–08./08. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°C**
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 07./08. kl 6⁰⁰–08./08. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í august: 7,2 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 21 |
| Tromsø | 19 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannahavn | 17 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 30 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 32 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

sosialurin Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes

## Vestfalskyrrindi

7. aug.: Fyrra kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini
15. aug.: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. aug. | 02.14 | 14.49 | 01.14 | 13.49 | 01.29 | 14.04 | 04.14 | 16.49 | 05.14 | 17.49 | 00.29 | 13.04 | – | 12.04 | 02.29 | 15.04 | 03.29 | 16.04 | 01.59 | 14.34 | 03.14 | 15.49 |
| 10. aug. | 03.27 | 15.59 | 02.27 | 14.59 | 02.42 | 15.14 | 05.27 | 17.59 | 06.27 | 18.59 | 01.42 | 14.14 | 00.42 | 13.14 | 03.42 | 16.14 | 04.42 | 17.14 | 03.12 | 15.44 | 04.27 | 16.59 |
| 11. aug. | 04.28 | 16.55 | 03.28 | 15.55 | 03.43 | 16.10 | 06.28 | 18.55 | 07.28 | 19.55 | 02.43 | 15.10 | 01.43 | 14.10 | 04.43 | 17.10 | 05.43 | 18.10 | 04.13 | 16.40 | 05.28 | 17.55 |
| 12. aug. | 05.20 | 17.45 | 04.20 | 16.45 | 04.35 | 17.00 | 07.20 | 19.45 | 08.20 | 20.45 | 03.35 | 16.00 | 02.35 | 15.00 | 05.35 | 18.00 | 06.35 | 19.00 | 05.05 | 17.30 | 06.20 | 18.45 |

Kelda: Skipalistin 2000